# ÁRSFRÁSØGN 2022

FØROYA TELE **SAMTAKIÐ**

FØROYA TELE TELEVARPIÐ NET SHEFA

# 5 ára yvirlit – samtakið

| Mió kr. | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Inntøkur tilsamans | 415 | 407 | 389 | 385 | 380 |
| Bruttoúrslit | 217 | 216 | 205 | 206 | 208 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) | 114 | 118 | 102 | 109 | 114 |
| Úrslit áðrenn rentur (EBIT) | 13 | 45 | 35 | 40 | 50 |
| Ársins úrslit | 14 | 41 | 31 | 33 | 48 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Støðisogn | 654 | 576 | 579 | 515 | 519 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 177 | 70 | 115 | 58 | 54 |
| Íløgur í immateriella støðisogn | 7 | 4 | 11 | 10 | 7 |
| Ogn í umferð | 138 | 219 | 187 | 196 | 212 |
| Ogn tilsamans | 792 | 794 | 766 | 711 | 730 |
| Eginpeningur | 522 | 538 | 530 | 533 | 534 |
| **Peningastreymur** | | | | | |
| Frá rakstri | 99 | 144 | 72 | 89 | 112 |
| Frá íløgum | -182 | -73 | -126 | -68 | -36 |
| Frá fígging | -6 | -27 | 24 | -32 | -15 |
| Broyting í tøkum peningi | -89 | 44 | -29 | -10 | 61 |
| Fríur peningastreymur | -83 | 71 | -53 | 21 | 77 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| EBITDA í mun til sølu lutfall | 27,6 | 28,9 | 26,1 | 28,3 | 30,1 |
| Rakstraravkast | 3,1 | 11,0 | 9,1 | 10,5 | 13,1 |
| Ognaravkast | 1,6 | 5,7 | 4,6 | 5,7 | 6,8 |
| Gjaldførisevni | 112,2 | 217,8 | 224,5 | 235,3 | 238,9 |
| Trygdarevni | 66,0 | 67,8 | 69,2 | 74,9 | 73,2 |
| **Aðrar upplýsingar** | | | | | |
| Starvsfólk (ársverk) | 178 | 179 | 183 | 179 | 178 |
| Inntøkur fyri hvørt starvsfólki (mió. DKK) | 2,329 | 2,276 | 2,128 | 2,149 | 2,135 |
| Úrslit fyri hvørt starvsfólk (mió. DKK) | 0,079 | 0,226 | 0,170 | 0,186 | 0,270 |

Allar upphæddir eru í mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstraravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/inntøkur |
| Ognaravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/ogn tilsamans |
| Gjaldførisevni | = | (ogn í umferð x 100)/stuttfreistað skuld |
| Trygdarevni | = | (eginpeningur, íroknað minnilutaeigarar x 100)/ogn tilsamans |

# Innihaldsyvirlit

VIT ERU ØLL FØROYA TELE SAMTAKIÐ ..... 1
BURÐARDYGT SAMTAK ..... 2
KUNDIN Í ØLLUM ..... 3
MILLUM TEY FREMSTU ..... 5
SAMBAND OG SAMSTØRV ÚT Í HEIM ..... 7
VÁÐASTÝRING ..... 9
UMHVØRVISÁBYRGD ..... 10
VITANARTILFEINGI ..... 10
SAMFELAGSÁBYRGD ..... 10
BÚSKAPARÁRIÐ ..... 11
VINNINGSBÝTI ..... 11
EIGARAVIÐURSKIFTI ..... 11
ÚTLIT FYRI 2023 ..... 11
MERKISVERDIR TILBURÐIR EFTIR ÁRSENDA ..... 12
ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR ..... 13
GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA ..... 14
RAKSTRARROKNSKAPUR ..... 17
FÍGGJARSTØÐA ..... 18
PENINGASTREYMSYVIRLIT ..... 20
NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR ..... 28
NEVND & STJÓRN ..... 33

Upplýsingar um felagið
Skrásetingarnavn: P/f Telefonverkið · Skrásetingarnr.: 2697
Hjánavn: Føroya Tele · Bústaður: Klingran 5, 188 Hoyvík
Heimstaðarkommuna: 100 Tórshavn · Tel: +298 303030
Heimasíða: www.ft.fo · Teldupostur: ft@ft.fo

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 2022

# VIT ERU ØLL FØROYA TELE SAMTAKIÐ

Føroya Tele samtakið tók stór tøk í 2022. Okkara dugnaligu starvsfólk hava lagt nógva orku í risaverkætlanir, ið myndaðu árið. Vit hava hildið saman og drigið somu línu, raðfest kundan fram um alt og lagt spírar í enn betri kundaupplivingar. Orka og avrik frá øllum síðum tryggjaði eitt væleydnað og virkið ár.

Vit náddu nógv av okkara settu málum í 2022. Burðardygga langtíðarætlanin fyri samtakið varð sett í formligar karmar, vit hava lagt um til fipurtøkni hjá fleiri enn 3.000 húsarhaldum, settu met við nærum 900 tímum av egnum framleiddum sjónvarpstilfari, skiftu RAN-netið út til nýggja 5G-tøkni og undirskrivaðu avtalu um samstarv um farnetið.

Haraftrat vóru stór fet tikin í talgilda umskiftinum í samtakinum, umframt at tekniska endaútgerðin í Shefa varð skift og dagførd fyri at tryggja enn hægri kapasitet á uttanlandssambandinum.

## STARVSFÓLKINI ERU DRÍVMEGIN

Vit vilja knýta øll og alt í eina betri framtíð, men tað er gjøgnum starvsfólkini, at vit røkka okkara málum. Samtakið skal vera so menniskjaligt sum yvirhøvur til ber, og tí leggja vit stóran dent á framburð millum starvsfólk.

Saman við fjølbroyttum førleikum og eginleikum skulu vit sum starvsfólk vera best, fremst, ábyrgdarfull og slóðbrótarar. Hesi grundvirði eru partur av okkara DNA sum starvsfólk og liggur sum ein reyður tráður gjøgnum samtakið.

Greiðar synergieffektir millum deildir og feløg í samtakinum skapa sjálvsagdan gróðrarbotn fyri menning, og góða gongdin í samtakinum er í stóran mun grundað á hesar samanrenningar.

Tað er umráðandi, at starvsfólk eru tilvitað um teirra leiklut og menningarmøguleikar, og vit arbeiða tískil miðvíst við at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har ið starvsfólk trívast, eru motiverað og mennast.

Uppgávan at varðveita høga starvsfólkanøgdsemið frá undanfarnum árum er stór, men tað eydnaðist okkum at fáa methøg úrslit í 2022, tá ið vit skoraðu 81 indeksstig í arbeiðsgleði og 87 í trúfesti.

Kanningin fevnir um nógvar brigdlar, ið samanlagt lýsa nøgdsemi. Tvørgangandi av øllum økjum fær samtakið góð úrslit. Eitt nú geva starvfólk samtakinum heili 87 indeksstig í umdømi.

Tað eydnaðist okkum enn eina ferð at fáa luttøku á heili 94%, sum gevur ábending um, at øll taka tøk og ábyrgd av trivnaðinum. Full orka verður løgd í at tryggja somu góðu úrslit og trivnað frameftir.

Tað var somuleiðis starvsfólkum at takka, at vit í árunum, koronufarsóttin herjaði á, hildu staðiliga fast um herd átøk. Hóast vit tíðliga í árinum settu punktum á tíðina við koronu, hava vit nú eina tilbúgving klára, so at samtakið kann umstilla seg aftur, um ein nýggj alda við alheimsfarsótt rakar.

## MØGULEIKAR OG JAVNVÁG

Sum samtak vilja vit, at øll starvsfólk hava somu møguleikar fyri menning.

Sum samtak vilja vit umboða bæði kyn á jøvnum føti. Vit eru av tí sannføring, at vit kunnu skapa eitt enn betri arbeiðs-umhvørvi og skynsamari virksemi, um vit áhaldandi skapa umstøður fyri at náa einum jøvnum kynsbýti.

Samtakið er sett saman av nógvum virkisøkjum, sum søguliga hava havt meiriluta av mannfólki knýtt at starvshópinum. Tó hava vit seinastu tíðina upplivað, at fleiri og fleiri kvinnur stíga inn á hesi starvsøki. Hesari gongd ynskja vit at halda fast um og stuðla, soleiðis at vit fáa eitt javnari kynsbýti í øllum feløgum í samtakinum.

Eitt av okkara aðalmálum er at flyta serfrøði og vitan á enn fleiri starvsfólk og virkisøkir soleiðis, at møguleikar fyri menning gerast størri. Harumframt er gongd sett á arbeiðið at skapa eitt enn breiddri lærlingaumhvørvi í samtakinum, ið skal gera tað møguligt hjá ungum at nema sær virkisútbúgving innan enn fleiri fjølbroytt virkisøkir í samtakinum.

Vónin er, at hetta kann lata dyrnar upp fyri enn fleiri fakligum møguleikum hjá ungum kvinnum og monnum í samfelagnum.

Kynsbýtið í leiðslusamansetingum og nevndarhøpi fyri samtakið gongur á odda í mun til kósina fyri javnari kynsbýti. Kósin er sett, og vit halda fram at tryggja ein starvsfólkahóp, ið er skynsamt samansett-ur og umboðar bæði kyn á jøvnum føti.

# BURÐARDYGT SAMTAK

Ábyrgd er fyri okkum natúrlig og einføld. Vit skulu virka fyri burðardyggari menning og vøkstri, og samstundis verja natúrliga tilfeingið fyri komandi ættarlið.

Vit hava gjørt eina burðardygga langtíðarætlan fyri samtakið, sum vit hava trekt heilt niður á jørðina. Talan er um eina ætlan, ið er forankrað í okkara gerandisdegi og kjarnuvirksemi.

Í 2021 varð hol sett á arbeiðið at seta burðardyggu langtíðarætlanina í form-ligar karmar. Hetta merkir eitt nú, at vit máta og gera okkara CO2-útlát á vav 1 og 2 upp og almannakunngera hesi tøl.

Arbeiðið gera vit sum partur av samstarv-inum við Burðardygt Vinnulív.

Vit vilja slóða fyri og hava sett okkum sum mál at vera CO2-frí á vav 1 og 2 í 2030. Við elbilum, jarðhita, sjóhita og øðrum átøkum eru vit væl við, og minkaðu um CO2-útlátið við nærum 323 tonsum í 2022.

At verja umhvørvið og nýta orku skynsamt er ikki fremmant fyri okkum. Í okkara 130 bygningum runt landið hava vit seinastu árini leypandi skift til grøna orku.

Arbeiðið er væl ávegis, og einans tveir bygningar vanta nú í málinum um oljufríar bygningar. Nýggja tøknihúsið í Miðvági varð tikið í nýtslu í vár. Húsið brúkar oljufríar orkuskipanir við sólorku. Í 2022 var framleiðslan av sólpanelum 3.500 kwh, og mett verður, at árliga framleiðslan fer at liggja á 5.000 kwh.

Meðan vit lúka treytirnar um at veita farnet í heimsklassa, taka vit eisini stór fet á leiðini at minka um okkara umhvørvis-fótaspor, tí tey eru beinleiðis knýtt at farnetinum.

Í 2020 varð ferð sett á at menna eitt enn skynsamari farnet við orkusparandi still-

ingum, sum leggja upp fyri fólkatættleika og nýtslu.

Nýggja farnetið frá Ericsson er uppaftur meira dynamiskt og gongur hond í hond við okkara aðalmál um burðardygga menning.

Burðardygd er tó meira enn útlát og grøn orka. Burðardygd fevnir eisini um okkara framburð millum okkara starvsfólk og kundar.

Hjartaslátturin í samtakinum eru okkara dugnaligu starvsfólk. Føroya Tele skal, við denti á framburði millum starvsfólk, vera so menniskjaligt sum yvirhøvur til ber. Hóast vit eru ein samanbundin eind, eru tað júst okkara ymisku eginleikar, sum eru við til at skapa heildina. Við ymiskum bakgrundum og eginleikum skulu vit vera best, fremst, ábyrgdarfull og slóðbrótarar.

# KUNDIN Í ØLLUM

Føroya Tele hevur seinastu mongu árini lagt lunnar undir føroyska telemarknaðin við dygdargóðum produktum og tænastum til kappingarførar prísir.

Áhaldandi kappingin á marknaðinum er hørð, men hóast hetta, er marknaðarparturin hjá Føroya Tele støðugur á bæði privat- og vinnumarknaðinum.

Í 2022 var framhaldandi vøkstur í talinum av føstum mánaðarligum breiðbands- og fartelefonhaldum. Hetta fegnast vit um, og vóna áhaldandi at vera við at tryggja kappingarføri og stuðla undir góðari og sunnari kapping á marknaðinum.

Tað skal vera lætt at vera kundi, og vit ynskja at møta kundanum, har hann er. Hetta er galdandi bæði í mun til okkara fimm Telebúðir kring landið, sum leggja dent á at veita vørur og nærlagda tænastu í nærumhvørvinum, og í mun til allar tær einstøku tænasturnar, sum vit bjóða kundum okkara.

Í 2022 bjóðaðu vit kundum okkara nýggjar og dagførdar tænastur innan bæði privat og vinnu. Harafturat settu vit hol á nýggj samstørv um burðardyggar leistir.

## ENN BETRI TÆNASTUR

Tá ið vit hugsa góða tænastu til kundan, hugsa vit um gjøgnumskygni og sjálvræði til kundan. Hetta merkir, at vit ynskja at okkara kundar ómakaleyst hava møguleika fyri at avgreiða øll viðurskifti umvegis góðu sjálvgreiðslur okkara.

Í 2022 varð Mítt Ver dagført við nýggjum hentleikum, og denti á at geva kundum mest møguligt sjálvræði til lætt at avgreiða síni viðurskifti á netinum, júst tá ið kundin hevur tørv á tí. Á dagførda Mítt Ver kunnu kundar stovna og umsita hald og tænastur so sum VerSumHeima, breiðband og Ver Fleks.

Ver Fleks er nýggj tænasta, sum sá dagsins ljós í 2022. Við Ver Fleks geva vit kundunum nýggjan møguleika at knýta summarhúshald at farnetinum og ómakaleyst umsita hald í Mítt Ver.

Við Ver Fleks kunnu kundar lætt hava farbreiðband við sær á ferð í Føroyum, um tað er í summarhús, bát ella tjald.

Ver Breiðband varð í 2022 latið í nýggjan ham. Tað skal vera einfalt at vera kundi, og við dagførdu Ver Breiðbandsheldunum er dentur lagdur á kundarnar, óansæð hvar teir eru í landinum, so teir lætt kunnu síggja hvussu teir fáa besta hald til teirra tørv, sama um tøknin er kopar, fipur ella farbreiðband.

VerSumHeima er ein tænasta, ið okkara kundar eru sera fegnir um. Við VerSumHeima kundu Ver-kundar uttan eykakostnað í 2022 ferðast til og reika

sum heima í heili 86 londum. VerSumHeima er ein tænasta vit eru errin av og áhaldandi víðarimenna.

Við nýggju tænastuni, Být & bøt um, verður øktur dentur lagdur á burðardygd og at veita kundum okkara góðar tænastur. Vit endurnýta og burturbeina fartelefonir og teldlar. Við hesi tænastuni veita vit 100% dátutrygd fyri innihald á innlatnu lutunum og í flestu førum kann upp til 95% av tólinum endurnýtast.

## VIÐLEIKARI HJÁ VINNUNI

Vit seta kundan í miðdepilin í øllum vit gera, og menna okkara førleikar til altíð at skapa einfaldar loysnir og slóða fyri framburði. Soleiðis veita vit kundunum fjarskifti, tænastur og vørur í heimsklassa.

Okkara vinnuráðgevar eru virknir samstarvsfelagar hjá vinnuni. Vinnan kennir tørvin, men vit hava førleikar at stuðla henni. Vit tæna, hjálpa og ráðgeva kundanum, eisini tá ið tørvurin broytist, tí soleiðis tryggja vit góðu heildarupplivingina fyri okkara vinnukundar.

Vit leggja áhaldandi dent á at menna produktir og tænastur, sum gera tað møguligt hjá kundum at avgreiða øll síni viðurskifti úr lógvanum.

Vinnurúmið er sjálvgreiðslupallurin hjá vinnuni, og hesin varð í 2022 víðari-mentur til at fevna um enn fleiri hentleikar. Endamálið er at stuðla okkara kundum við amboðum, sum lætta um teirra gerandisdag og stuðla undir teirra virksemi.

Við Vinnurúminum kunnu kundarnir sjálvir, tá ið tað passar teimum, umsita alt frá stovning av haldum, uppstiganum, niðurtøku, breiðbondum og NetTalu-hentleikum. Tað er ómakaleyst og vit seta áhaldandi orku til at víðarimenna Vinnurúmið í tráð við ynski og tørv hjá kundum okkara.

Nettala er grundarlagið undir samskiftinum hjá stórum parti av føroyska vinnulívinum og tí leggja vit allatíð dent á at víðarimenna tænasturnar, ið eru knýttar at Nettaluni. Í 2022 hevur dentur verið á sjálvgreiðsluamboð, ið gera tað enn lættari hjá kundum okkara at reka teirra fyritøkur.

Í 2022 hava vit eisini lagt dent á fleiri nýggj produktir og tænastur til vinnuna. Nýggja Flekshaldið er væl móttikið av kundunum, ið fegnast um nýggjar møguleikar.

Eisini eru fleiri samstørv farin av bakkastokki innan IoT, har ið vit á snildan hátt, sum samstarvspartnari eru við til at loysa ítøkiligar avbjóðingar, ið okkara kundar hava.

IoT økið er í stórari menning og vit eru júst byrjaði.

## KIMA KNÝTIR TILBÚGVINGINA

Tá ið vit menna og gera íløgur í nýggjar tænastur vilja vit altíð, at tær skulu vera við at slóða fyri og knýta øll og alt í eina betri framtíð.

KIMA er samskiftisskipan, sum er bygd á heimsklassafarnetið, ið røkkur út í hvønn krók í Føroyum.

Í 2022 arbeiddi samlaða tilbúgvingin við at finna leist fyri, hvussu tey kunnu knýta enn fleiri partar av kritisku tilbúgvingini í KIMA og á tann hátt samskifta tvørgangandi av økjunum í eitt nú kreppustøðum.

Í 2022 stóð KIMA somuleiðis sína roynd, tá ið hon var snúðningsdepil í stóru royndarvenjingini SMYRIL á flogvøllinum í Vágunum. Omanfyri 350 luttakarar frá 18 ymiskum myndugleikum, feløgum og felagsskapum luttóku í venjingini. Flestu

partar av tilbúgvingini vóru knýttir í KIMA undir venjingini, og skipanin riggaði væl at stuðla undir einstøku tilbúgvingareindunum og tvørfakliga samstarvinum.

### FINN ALT Á SONA

Leiting er stutta og einfalda lýsingin av tænastuni SONA. Appin er nærum í hvørjum lumma í Føroyum, og gevur møguleika fyri at brúkarar kunna finna viðkomandi upplýsingar um Føroyar á einum stað.

Sona er størsta app í Føroyum, og varð samanlagt tikin niður 49.000 ferðir í 2022. 1.6 mió. vitjandi vóru á heimasíðuni, www.sona.fo, og 6.3 mió. síður vórðu vístar á heimasíðuni.

Tænastan koyrir á egnum mentum palli, sum hevur við sær tryggan rakstur og haldføri bæði tøkniliga og vinnuliga.

### TELEVARPIÐ Í NÝHUGSANDI HAMI

Marknaðarstøðan hjá Televarpinum seinastu árini hevur verið merkt av kappingini um at varðveita kundaskaran og styrkja um kappingarstøðuna. Televarpið hevur aðalmálið at skilja seg burturúr millum kappingarneytarnar og veita kundanum eina heildaruppliving.

Við støði í hesum aðalmáli hevur felagið sett ferð á arbeiðið at menna egið føroyskt sjónvarpstilfar. Hetta hevur eydnast væl. Í 2022 setti Televarpið nevnliga met, tá ið felagið samanlagt sendi góðar 900 tímar av egnum sjónvarpstilfari.

Meginparturin av tilfarinum verður framleitt innanhýsis, meðan ein partur verður framleiddur í samstarvi við ítróttarella áhugafeløg. Fyri framman eru ætlanir um enn meira fjølbroytt sjónvarpstilfar í Televarpinum.

Millum nýggja tilfarið í 2022 var matsendingin VIST, Búskapur og Vinna, prátsendingar, upptaktir til og samandrátttur av ítróttartiltøkum.

Samtíðis leggur Televarpið áhaldandi dent á at tillaga rásvalið eftir tørvi og arbeiða við nýggjum pakkastrukturi og rættindaavtalum.

## MILLUM TEY FREMSTU

Einfalt samskifti skulu øll taka sum givið, og tað er tí, at vit áhaldandi arbeiða við at veita 100% landsumfatandi dekning, so øll hava atgongd til samskifti, sama hvar í landinum tey eru stødd.

Kring heimin síggja vit, at 5G er vorðið týðandi partur av grundarlagnum undir talgilda samfelagnum, har ið alsamt fleiri tól verða knýtt at internetinum. Soleiðis skal eisini verða her heima.

Í 2021 tóku vit risafetið, og í samstarvi við Ericsson fluttu vit okkum inn í framtíðina. Nógv stig eru í samlaðu verkætlanini, og í 2022 megnaðu vit stóra stigið at skifta alt RAN-netið út við nýggjastu farnetstøknina og uppstigað við 5G.

Arbeiðið innibar eitt nú at skifta út 166 sendistøðir og seta fleiri enn 30 nýggjar mastrar upp.

RAN-netið skal nú neyvstillast samtíðis við, at annar partur av verkætlanini, sum er at leggja um til Ericsson í kjarnutøknini, er farin í gongd.

### FRAMVEGIS Í HEIMSKLASSA

At uppstiga farnetið og útbyggja tað við 5G gjørdist eitt natúrligt fet fyri okkum, tí soleiðis varðveita vit aðalmálið um eitt heimsklassanet.

Á heysti 2021 varð farið undir fyrireikandi arbeiðið at skifta til nýggja farnetstøkni, sum fevndi um stórar umbyggingar og umstillingar av mastrum og farnetstøðum.

Í 2022 var full ferð á arbeiðinum at fáa farnetið at virka á nýggjastu tøknini frá Ericsson. Okkara dugnaligu starvsfólk hava tikið megnartøk í stóra arbeiðinum, og tað er teimum at takka, at vit komu á mál við hesum risataki í 2022.

## SAMSTARV UM FARNETIÐ

FT Samskifti, sum er kundavenda felagið í Føroya Tele samtakinum, og Nema gjørdu á heysti 2022 avtalu um at samstarva um nýggja farnetið.

Samstarvið byrjar, tá ið útbyggingin av nýggja farnetinum er liðug og fevnir um eins atgongd til RAN-netið. Hetta inniber dekning á landi og sjógvi um allar Føroyar til gagns fyri allar brúkarar.

Kundar hjá báðum veitarunum fáa sostatt atgongd til sama dekning, somu ferð og sama kapasitet. FT Samskifti eigur og rekur RAN-netið vegna báðar veitararnar.

Samstarvið fevnir ikki um kjarnutøknina í farnetinum. Veitararnir hava hvør sína kjarnu, sum stýrir teimum hentleikum, produktum og tænastum, ið veitararnir bjóða sínum kundum.

Hetta tryggjar framhaldandi kapping á marknaðinum, og brúkarin kann framvegis velja veitaran, sum gevur honum bestu haldini, bestu produktini og bestu tænasturnar.

Avtalan er treytað av, at Kappingareftirlitið góðkennir samstarvið.

## GÓÐ FERÐ Á FIPUR TIL HEIMIÐ

NET er tað, sum bindur okkum saman og syrgir fyri, at allir føroyingar kunnu taka ómakaleyst samskifti sum givið. Saman við samtakinum er aðalmálið at knýta øll og alt í eina betri framtíð. Hetta ger NET við at reka eitt trygt og nútíðarhóskandi kervi, sum tryggjar føroyingum atgongd til bestu og skjótastu tøknina.

Fyri góðum trimum árum síðani fór verkætlanin at leggja fipur inn til hvørt húsarhald av bakkastokki. Talan er um umfatandi, men neyðuga verkætlan, har ið alt undirstøðukervið við kopar verður skift út og lagt av nýggjum við fipur, sum gevur fleiri møguleikar.

Fipur er skynsamari í rakstri, tilfarið er bíligari, og tøknin er lættari atkomulig og lættari at umvæla.

Fipur Til Heimið (FTH) er eitt stig á grønu leiðini. Sum dømi kann nevnast, at Havnin í dag hevur 18 tøknihús í nýtslu. Tá ið alt FTH er lagt út, er ætlanin at hava 4 tøknihús í Havnini. Alt annað líka, verður hetta ein munandi orkusparing.

Aftrat hesum er framleiðslan av fipurkaðlum, ikki so orkukrevjandi, sum eitt nú koparkaðlar eru. Fipurtøknin letur haraftrat upp fyri, at telefeløgini í Føroyum kunnu bjóða ferðir, sum eru hægri enn 1.000 Mbit.

Í 2021 varð full ferð sett á arbeiðið at dagføra partin av kaðalnetinum, sum liggur út til kundan. Við ársenda 2021 høvdu 1.500 húsarhald fingið atgongd til fipurbreiðband. Við ársenda 2022 var hetta talið 3.000 húsarhald. Málið er at røkka 3.000 húsarhaldum afturat í 2023.

NET hevur avtalu við veitarar um grevstur av fipurneti til húsarhald og fyritøkur, umframt avtalu við el-fyritøkur um at leggja sjálvan fipurkaðalin inn og seta útgerðina upp hjá kundunum. Tilsamans fimm útboð hava verið, síðani verkætlanin fór av bakkastokki.

## ÚTBYGGINGAR TIL 5G

5G-tøknin skapar nýggjan tørv á kervinum og setir krøv um umskipan av farnetskipanum. Hetta krevur eitt nú skifti av og arbeiði í mastrum, elveitingum, arbeiði í húsum og fipurleggingum.

Arbeiðið og útbyggingarnar spældu stóran leiklut gjøgnum árið, og nógv orka varð løgd í frá starvsfólkum og veitarum.

### FIPURKAÐLAR ØKJA UM TRYGDINA

Nýggju undirsjóvartunlarnir fara at økja um trygdina á innanlands høvuðs-sambondunum, serliga tí at teir liggja tryggari enn gomlu sjókaðlarnir.

Eins og fipurkaðlarnir vórðu lagdir í Eysturoyartunnilin verða fipurkaðlar eisini lagdur í nýggja undirsjóvartunnilin til Sandoynna. Arbeiðið hevur við sær tryggari samband, og at sjókaðalin millum Gomlurætt og Skopun kann takast úr nýtslu.

## SAMBAND OG SAMSTØRV ÚT Í HEIM

Føroyar liggja fjarskotnar, og tí er umráðandi, at vit ikki liva avbyrgd frá umheiminum. Gott, støðugt og álítandi samband er fortreyt fyri, at fyritøkur og fólk í Føroyum kunnu avgreiða síni gerandisviðurskifti.

Shefa hevur til endamáls at tryggja sambandið út í heim. Í 2022 stóðu útlendskir kundar í donskum og bretskum sjóøki fyri áleið 74% av søluni hjá felagnum.

Sjókaðlarnir knýta Føroyar saman við umheimin. Sjókaðlarnir Shefa-2, Cantat-3 og nýggji kaðlin Hronn, sum Shefa eigur, eru saman við íslendska Farice-1 kaðalinum týðandi sambond við umheimin hjá kundum og fyritøkum í Føroyum. Í sama mun hava Shefa-2 og Cantat-3 kaðlarnir týðandi sambond til frálandavinnuna bæði vestan fyri Hetland og í danska partinum av Norðsjónum.

### TRÝ KAÐALBREK Á SHEFA-KAÐALIN

Tíverri varð Shefa-kaðalin raktur av ikki færri enn trimum brekum í 2022. Tvey tey fyrstu brekini hendu vestan fyri Hetland, meðan triðja brekið hendi millum Hetland og Orknoyggjar.

Í øllum trimum førum var talan um útlendsk skip og trolarar, ið vóru atvold til brekini. Øll trý brekini vórðu umvæld innan stutta tíð, og arbeitt verður við at fáa endurgjald fyri skaðarnar.

### TVEY ELLA TRÝ KAÐALSAMBOND

Sambandið til umheimin verður í dag í størsta mun tryggjað av sjókaðlunum hjá Shefa og Farice, men útbyggingar verða hesi árini gjørdar av veitarum av fylgisveinatænastum, sum framyvir eisini koma at bjóða altjóða sambond.

Roknast kann við, at sjókaðlar framhaldandi koma at bera høvuðspartin at samskiftinum við umheimin. Nýggju tænasturnar fara tó at geva fleiri møguleikar fyri sambondum, og harvið eisini veita størri trygd fyri, at samband altíð er tøkt.

Tað er við støði í hesi staðfesting, at Shefa hevur gjørt eitt arbeiði at meta um, um tað er nøktandi við tveimum kaðal-sambondum, ella um tað er neyðugt at leggja ein nýggjan kaðal millum Føroyar og útheimin. Niðurstøðan av innleiðandi kanningararbeiðinum er, at vit framyvir eiga at leggja dent á at hava fleiri enn tvey kaðalsambond.

Vit fara framhaldandi at arbeiða við at finna fram til røttu avgerðina, sum í stóran mun er treytað av einum fíggjarliga sterkum samtaki.

### HRONN Í GÓÐUM STIMA

Í 2019 varð avtala gjørd við oljufelagið TotalEnergies um at leggja nýtt kaðalsamband til Halfdan-oljuøkið í danska partinum av Norðsjónum, og í 2020 varð arbeiðið gjørt at leggja 220

kilometra langa sjókaðalin, ið hevur fingið navnið Hronn.

Sjókaðalin gongur millum høvuðs-skrivstovuna hjá TotalEnergies í Esbjerg og Halfdan-oljuøkið, og saman við Cantat-3, sum varð knýttur í Tyra-oljufeltið í 2012, tryggjar hann, at TotalEnergies hevur eitt trygt og støðugt samband til teirra virksemi í Norðsjónum.

Sum framhald av Hronn-verkætlanini er nýtt samband gjørt millum tvey av oljuøkjunum í danska partinum av Norðsjónum.

Alt arbeiðið varð gjørt í 2022. Tað næsta arbeiðið, sum verður gjørt til danska partin av Norðsjónum er at dagføra Cantat-3, so hann kann veita tænastu til danska økið mong ár framyvir.

Í 2022 varð tekniska útgerðin til Shefa kaðalin dagførd í kaðalstøðunum í Føroyum, Hetlandi, Orknoyggjum og Skotlandi.

Dagføringin hevði við sær, at kapasiteturin í kaðalinum er øktur munandi, og sostatt kann fylgja við vaksandi dataflutningi millum Føroyar og útheimin nógv ár framyvir.

# VÁÐASTÝRING

## ALMENNUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at føroyska búskapinum, tí største parturin av inntøkunum og virkisøkjunum er í Føroyum. Sveiggj í føroyska búskapinum kunnu tí ávirka samtakið. Føroya Tele skal megna at laga seg til umstøðurnar, og arbeiðir tískil støðugt við at minka um allar váðar.

## TØKNILIGUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at fjølmentari tøkni. Onkrar tøkniligar íløgur kunnu vísa seg ikki at hava ta livitíð, ella kasta ikki tað av sær, ið væntað var. Hetta kann millum annað vera orsakað av skjótari tøkniligari menning, ið ger íløgur ótíðarhóskandi, ella broyttum eftirspurningi frá kundum. Framstig hava negativar avleiðingar, um Føroya Tele ikki heldur seg frammarlaga tøkniliga; serliga samanborið við tey, sum samtakið kappast beinleiðis við.

## INFRASTRUKTURVÁÐI

Føroyar liggja so fjarskotnar í mun til umheimin, at vit hava tørv á tryggum uttanlandssamskifti til evropiska meginlandið. Hetta hevur við sær, at Føroyar og Føroya Tele hava ein váða í at missa uttanlandssambandið.

Føroya Tele eigur tveir undirsjóvarkaðlar út í heim. Shefa-2, sum varð tikin í nýtslu í 2008, og Cantat-3, sum varð yvirtikin í 2012. Harumframt verður eyka kapasitetur og redundansur keyptur á Farice kaðlinum millum Føroyar, Ísland og Skotland. Sostatt eru trý kaðalsambond tøk, og tað minkar munandi um váðan at missa tele- og datasambandið við restina av heiminum.

Aðrir týðandi váðar ið knýta seg at undirstøðukervinum, eru vaksandi hóttanin frá cyber-álopum. Hesin váðin er blivin alsamt meir sjónligur við broyttu geopolitisku støðuni. Cyber-álop kunnu hava við sær álvarsligar fylgir fyri kunningar- og fjarskiftistøknina ið Føroya Tele varðar av. Ófullfíggjað ella vantandi trygdarfyriskipanir kunnu føra til brek ið darva rakstur og tænastur.

Við serstøku ábyrgdini sum Føroya fremsti fjarskiftisveitari, er tað týdningarmikið at Føroya Tele áhaldandi arbeiðir við at avmarka hesar váðarnar. Hetta verður gjørt við íløgum í trygdarskipanir eins og mannagongdir verða viðlíkahildnar og dagførdar og íkomnir váðar verða skrásettir.

## GJALDSOYRAVÁÐI

Føroya Tele samtakið hevur sítt størsta virksemi í Føroyum, og meginparturin av avrokningunum eru í donskum krónum. Av øðrum gjaldoyrum fara gjaldingar fram í evrum, US dollarum og bretskum pundum. Eftir at hava mett um hesar peningaupphæddir og teir váðar, ið knýta seg at hesum, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er avmarkaður.

## RENTUVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av rentustøðinum, orsakað av at samtakið hevur lutfalsliga lítla rentuberandi skuld. Eftir at hava mett um rentuváðan er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er nøktandi avmarkaður.

## KREDITTVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av einstøkum kundum ella samhandilsfeløgum. Samtakið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum og somuleiðis við samstarvsfeløgum.

Føroya Tele setur í høvuðsheitum sítt gjaldføri í SIFI fíggjarstovnar í Føroyum og Danmark.

## UMHVØRVISÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa umhvørvisábyrgd. Upplýsingar um umhvørvispolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

## VITANARTILFEINGI

Føroya Tele virkar í eini hátøkniligari vinnugrein, sum krevur, at starvsfólk altíð hava dagførda vitan hvat tøkni og tænastu viðvíkur. Gjøgnum árið hevur felagið áhaldandi ment starvsfólk við venjingum og skeiðum.

Felagið ynskir eisini at draga at sær vælútbúgvin fólk við viðkomandi vitan og førleikum innan virkisøkir felagsins.

## SAMFELAGSÁBYRGD

Í samsvari við ársroknskaparlógina hevur Føroya Tele orðað ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa samfelagsábyrgd. Upplýsingar um samfelagspolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/samfelagstilvit.

# BÚSKAPARÁRIÐ

Í 2022 hevur Føroya Tele skift størstapartin av Huawei farnetinum út. Hóast hetta stórliga ávirkar ársins úrslit við eyka avskrivingum og tap við frágongd av ognunum er úrslitið sum heild nøktandi. Ársins úrslit er væl lægri enn í 2021, men bruttoúrslit og úrslit áðrenn avskrivingar eru á støði við 2021 og ímillum tey bestu síðan 2018.

### RAKSTUR

Nettosølan hjá samtakinum vaks úr 407 mió. kr. til 415 mió. kr. Vøksturin í søluni stavar í stóran mun frá øktari sølu av telefon- og sjónvarpstænastum. Rakstrarkostnaðirnir í samtakinum øktust við 7 mió. kr. til 198 mió. kr. Umframt generelt prístrýst er tað serliga ein økt fyrisitingarlig byrða og hækkandi gjøld til almennu myndugleikarnar, sum eru orsøkir til hægru rakstrarkostnaðirnar.

Starvsfólkakostnaðirnir hækkaðu úr 99 mió. kr. til 102 mió. kr.

Rakstrarúrslitið, áðrenn avskrivingar, fyri 2022 gjørdist 114 mió. kr. samanborið við 118 mió. kr. árið fyri.

Avskrivingarnar vóru 102 mió. kr, sum er 29 mió. kr. hægri enn í 2021. Harav stava 31 mió. kr. frá eyka avskrivingum og frágongd av Huawei ognum í farnetinum.

Ársúrslitið eftir skatt hjá Føroya Tele gjørdist eitt avlop á 14 mió. kr. í 2022 samanborið við 41 mió. kr. í 2021.

### ÍLØGUR

Í 2022 gjørdi samtakið samanlagt íløgur fyri 177 mió. kr. í materiella støðisogn umframt 7 mió. kr. í immateriella støðisogn. Í 2021 vóru samlaðu íløgurnar 74 mió. kr.

### FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Fíggjarstøðan javnvigaði við 792 mió. kr. 31. desember 2022. Við ársenda 2021 var javnvágin 794 mió. kr. Eginognin var tilsamans 522 mió. kr. við ársenda 2022 samanborið við 538 mió. kr. árið fyri.

Við ársenda 2022 varð støðisognin tilsamans 654 mió. kr. samanborið við 576 mió. kr. við ársenda 2021. Av samlaðu støðisognini við ársenda 2022 vóru 625 mió. kr. materiell støðisogn. Ogn í umferð var 138 mió. kr.

Skuldin hjá Føroya Tele við ársenda 2022 var samanlagt 225 mió. kr. samanborið við 205 mió. kr. við ársenda 2021. Av samlaðu skuldini vóru 102 mió. kr. langfreistaðar tíðaravmarkingar.

### ÚRSLIT FYRI 2022

2022 hevur verið merkt av, at samtakið hevur gjørt stórar íløgur í millum annað fipur-til-heimið, og at verandi farnet verður skift út og uppstigað við nýggjastu farnetstøknini frá Ericsson.

Eins og roknað varð við, varð bruttoúrslitið í 2022 á støði við 2021, ímeðan ársúrslitið gjørdist lakari orsakað av øktum av- og niðurskrivingum.

# VINNINGSBÝTI

Nevndin mælir til, at eitt vinningsbýti á 30 mió. kr. verður útgoldið fyri fíggjarárið 2022.

# EIGARAVIÐURSKIFTI

Føroya Landstýri eigur allan partapeningin.

# ÚTLIT FYRI 2023

Samtakið ger komandi árini framhaldandi stórar íløgur í millum annað fipur-til-heimið. Áhaldandi menningin av inntøku-

grundarlagnum, og talgildingin av samtakinum heldur fram í 2023 og skal tryggja, at Føroya Tele framhaldandi kann veita enn betri produktir og tænastur.

Búskaparstøðan hjá føroyskum húsarhaldum og fyritøkum er tó ein óvissa, ið væntandi fer at ávirka gongdina í 2023.

Samanumtikið metir Føroya Tele, at úrslitið áðrenn avskrivingar í 2023 gerst lakari orsaka av hækkandi prísstøði, ímeðan samlaða úrslitið gerst betri samanborið við 2022.

## MERKISVERDIR TILBURÐIR EFTIR ÁRSENDA

Ongir merkisverdir tilburðir hava verið eftir ársenda í 2022.

# ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2022 fyri P/F Telefonverkið.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við galdandi føroyskar roknskaparreglur.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Vit meta, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2022 umframt av peningastreymi og úrslitinum av virksemi felagssins og hjá samtakinum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2022.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenning ársaðalfundarins.

Hoyvík, hin 24. apríl 2023

**STJÓRN**

Jan Ziskasen, samtaksstjóri

**NEVND**

Bjarni Arnason, formaður

Levi T. Nybo, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Johnni Poulsen, næstformaður

Ólavur Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Annbritt Tummasdóttir Andersen, nevndarlimur

Finnbjørn Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Lena L. Mohr, nevndarlimur

# GRANNSKOÐANAR-ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## TIL KAPITALEIGARARNAR Í P/F TELEFONVERKIÐ

## NIÐURSTØÐA

Vit hava grannskoðað samtaksroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Telefonverkið fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, notum og peningastreymsuppgerð fyri bæði samtakið og felagið. Samtaksroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av samtaksins og felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av samtaksins og felagsins virksemi og peningastreymi samtaksins og felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2022 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av samtaksroknskapinum og ársroknskapinum". Vit eru óheft av samtakinum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein samtaksroknskap og ein ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið samtaksroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein samtaksroknskap og ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so, at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka samtakið ella felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

## ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV GRANNSKOÐANINI AV SAMTAKSROKNSKAPINUM OG ÁRSROKSNKAPINUM

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at samtaksroknskapurin og ársroknskapurin sum heild eru uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum

um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið rokn-skaparbrúkararnir taka við støði í samtaksroknskapinum og ársroknskap-inum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grann-skoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í samtaks-roknskapinum og ársroknskap-inum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grann-skoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjala-falsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera samtaksroknskapin og ársroknskapin grundað árokn-skaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt samtakið og felagið megna at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanar-átekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í samtaksroknskapinum og árs-roknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í fram-tíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at samtakið og felagið ikki eru før fyri at halda áfram við rakstrinum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og inni-haldið í samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, íroknað upplýs-ingarnar í notunum umframt um samtaksroknskapurin og ársrokn-skapurin vísa transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

- Fáa vit neyðug og nøktandi grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum fyri feløgini ella handilsvirksemi í samtakinum, soleiðis at vit kunnu geva eina niðurstøðu um samtaksroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og fremja samtaksgrannskoðanina. Vit hava eina ábyrgd av okkara grannskoðanarniðurstøðu.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um samtaksroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av samtaksroknskapinum og ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og samtaksroknskapin ella ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við samtaksroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini

Tórshavn, 24. apríl 2023

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut.revisor

# RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar til 31. desember 2022

| Nota | | SAMTAK 2022 (t.kr.) | SAMTAK 2021 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2022 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2021 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | Nettosøla | 414.638 | 407.347 | 43.359 | 42.265 |
| 1 | **Inntøkur tilsamans** | **414.638** | **407.347** | **43.359** | **42.265** |
| | Útreiðslur til vørunýtslu, fjarskiftis-tænastur og ráskostnaðir | -116.662 | -117.123 | - | - |
| | Annar rakstrarkostnaður | -77.970 | -71.022 | -18.319 | -15.900 |
| | Gjald fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum | -3.393 | -2.738 | - | - |
| | **Bruttoúrslit** | **216.613** | **216.464** | **25.040** | **26.365** |
| 2 | Starvsfólkakostnaður | -102.259 | -98.699 | -21.667 | -20.580 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **114.354** | **117.765** | **3.373** | **5.785** |
| 3 | Avskrivingar av støðisogn | -101.581 | -72.772 | -5.873 | -6.727 |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **12.773** | **44.985** | **-2.500** | **-943** |
| 4 | Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum | - | - | 11.230 | 35.537 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í leyst atknýttum virkjum | 3.189 | 4.165 | 3.189 | 4.165 |
| 5 | Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur | 358 | 765 | 2.203 | 1.930 |
| | Rentuútreiðslur og tílíkar útreiðslur | -1.611 | -1.196 | -163 | -116 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **14.709** | **48.727** | **13.958** | **40.574** |
| 6 | Skattur | -698 | -8.192 | 52 | -40 |
| | **Ársúrslit** | **14.011** | **40.534** | **14.011** | **40.534** |
| | Býti av ársúrsliti | | | | |
| | Flutt frá undanfarna ári | 423.530 | 412.995 | 385.289 | 395.120 |
| | Ársúrslit | 14.011 | 40.534 | 14.011 | 40.534 |
| | **Til taks** | **437.540** | **453.530** | **399.299** | **435.655** |
| | Uppskot til vinningsbýti | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 |
| | Uppskriving til innara virði | - | - | -9.541 | 20.250 |
| | Flutt úrslit | 407.540 | 423.530 | 378.840 | 385.405 |
| | **Býtt tilsamans** | **437.540** | **453.530** | **399.299** | **435.655** |

# FÍGGJARSTØÐA

31. desember 2022

| Nota | | SAMTAK 2022 (t.kr.) | SAMTAK 2021 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2022 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2021 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | | |
| | Nýtslurættindi | 16.156 | 16.404 | 2.872 | 3.309 |
| 8 | **Immateriell støðisogn** | **16.156** | **16.404** | **2.872** | **3.309** |
| | Grundøki og bygningar | 160.537 | 156.809 | 113.178 | 116.733 |
| | Undirstøðukervi | 287.405 | 319.027 | 408 | 482 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | 39.560 | 41.719 | 9.284 | 6.916 |
| | Støðisogn í gerð | 137.649 | 27.094 | 2.330 | 2.134 |
| 9 | **Materiell støðisogn tilsamans** | **625.151** | **544.649** | **125.199** | **126.265** |
| 10 | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | - | - | 266.480 | 274.751 |
| 10 | Kapitalpartar í leyst atknýttum virkjum | 12.206 | 13.449 | 12.206 | 13.449 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 111.862 | 79.493 |
| | Onnur áogn | - | 1.200 | - | 1.200 |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | **12.206** | **14.649** | **390.548** | **368.893** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **653.513** | **575.702** | **518.619** | **498.467** |
| | Liðugvøra og handilsvøra | 22.344 | 18.118 | - | - |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **22.344** | **18.118** | **-** | **-** |
| | Áogn av sølu | 32.209 | 40.651 | 34 | 56 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 32.317 | 29.174 |
| | Áogn hjá leyst atknýttum virkjum | - | 1.822 | - | 1.822 |
| | Onnur áogn | 11.845 | 1.299 | 1.660 | 1.200 |
| | Tíðaravmarkingar | 9.903 | 5.736 | 599 | 464 |
| 11 | **Áogn tilsamans** | **53.957** | **49.509** | **34.610** | **32.716** |
| | **Tøkur peningur** | **62.190** | **151.032** | **1.241** | **19.257** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **138.491** | **218.659** | **35.851** | **51.973** |
| | **Ogn tilsamans** | **792.004** | **794.362** | **554.470** | **550.440** |

# FÍGGJARSTØÐA

31. desember 2022

| Nota | | SAMTAK 2022 (t.kr.) | SAMTAK 2021 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2022 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2021 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Skyldur** | | | | |
| | Partapeningur | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| | Yvirkursgrunnur | 24.869 | 24.869 | 24.869 | 24.869 |
| | Uppskriving til innara virði | - | - | 28.674 | 38.241 |
| | Fluttur vinningur | 407.540 | 423.530 | 378.866 | 385.289 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 |
| 12 | **Eginpeningur tilsamans** | **522.409** | **538.398** | **522.409** | **538.398** |
| 13 | Eftirløn fráfarin starvsfólk | 838 | 919 | 838 | 919 |
| 14 | Útsettur skattur | 33.919 | 38.637 | 2.466 | 2.606 |
| 15 | Aðrar avsetingar | 9.800 | 11.500 | - | - |
| | **Avsetingar tilsamans** | **44.557** | **51.056** | **3.304** | **3.525** |
| 16 | Tíðaravmarkingar | 101.600 | 104.492 | - | - |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **101.600** | **104.492** | **-** | **-** |
| 16 | Tíðaravmarkingar stuttfreistað | 18.906 | 24.450 | - | - |
| | Lánistovnar | 20.802 | - | 20.802 | - |
| | Vøru- og tænastuskuld | 53.453 | 40.312 | 2.815 | 3.798 |
| 6 | Partafelagsskattur | 3.928 | 5.796 | 87 | 363 |
| | Skuld til leyst atknýtt virki | 325 | - | 325 | - |
| | Onnur skuld | 26.025 | 29.857 | 4.727 | 4.355 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **123.439** | **100.415** | **28.757** | **8.517** |
| | **Skuld tilsamans** | **225.039** | **204.907** | **28.757** | **8.517** |
| | **Skyldur tilsamans** | **792.004** | **794.362** | **554.470** | **550.440** |

17 Nærstandandi partar
18 Veðsetingar, møguligar skyldur v.m.
19 Óvissa í sambandi við innrokning og virðisáseting
20 Høvuðsvirksemi

# PENINGASTREYMSYVIRLIT

| | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| | 2022 | 2021 | 2022 | 2021 |
| | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) |
| Inntøkur tilsamans | 414.63 | 407.347 | 43.359 | 42.265 |
| Kostnaður tilsamans | - | -297.774 | -39.934 | -36.519 |
| **Peningastreymur frá inntøkum og kostnaði** | **113.65** | **109.572** | **3.425** | **5.745** |
| Broyting í vørugoymslum | -4.226 | -1.530 | - | - |
| Broyting í áogn og goldið frammanundan frá kundum | -3.439 | 14.699 | -885 | -3.938 |
| Broyting vøru- og tænastuskuld, aðrari skuld og eftirl.skyldum | -7.170 | 21.255 | -783 | -38 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **98.821** | **143.996** | **1.758** | **1.769** |
| Íløgur í immateriella støðisogn | -6.988 | -3.906 | -549 | -682 |
| Íløgur í materiella støðisogn, netto | - | -68.932 | -3.821 | -3.355 |
| Íløgur í fíggjarliga støðisogn, netto | -53 | - | -53 | - |
| **Peningastreymur frá íløgum** | **-** | **-72.838** | **-4.423** | **-4.037** |
| **Fríur peningastreymur** | **-83.068** | **71.151** | **-2.665** | **-2.267** |
| Rentukostnaður, netto | -1.253 | -431 | 2.040 | 1.814 |
| Innanhýsis fígging | - | - | -32.369 | -6.702 |
| Lánistovnar | 20.802 | - | 20.802 | - |
| Móttikið vinningsbýti | 4.676 | 5.678 | 24.176 | 19.178 |
| Goldið vinningsbýti | -30.000 | -32.000 | -30.000 | -32.000 |
| **Peningastreymur frá fígging** | **-5.775** | **-26.753** | **-15.351** | **-17.710** |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, íløgum og fígging** | **-88.842** | **44.405** | **-18.016** | **-19.978** |
| Tøkur peningur 1. januar | 151.03 | 106.628 | 19.257 | 39.234 |
| **Tøkur peningur 31. desember** | **62.190** | **151.032** | **1.241** | **19.257** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| Nota | | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2022 | 2021 | 2022 | 2021 |
| | | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) |
| 1 | **INNTØKUR FYRI SAMTAKIÐ - BÝTT GEOGRAFISKT** | | | | |
| | Føroyar | 358.942 | 350.266 | - | - |
| | Útland | 55.696 | 57.080 | - | - |
| | **Inntøkur fyri samtakið tilsamans** | **414.638** | **407.347** | **-** | **-** |
| 2 | **STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR** | | | | |
| | Lønir | -85.827 | -83.303 | -18.458 | -17.568 |
| | Eftirlønargjøld | -11.895 | -11.010 | -2.289 | -2.094 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | -4.537 | -4.385 | -920 | -918 |
| | **Starvsfólkakostnaður tilsamans** | **-102.259** | **-98.699** | **-21.667** | **-20.580** |
| | **Løn og samsýning til stjóra og nevnd** | **-3.200** | **-3.435** | **-3.200** | **-3.435** |
| | Løn til íløgur | 3.873 | 2.530 | - | - |
| | Fulltíðarsett størv | 178 | 179 | 30 | 31 |
| 3 | **AVSKRIVINGAR AV STØÐISOGN** | | | | |
| | Immateriell støðisogn | -7.236 | -7.516 | -987 | -920 |
| | Grundøki og bygningar | -5.856 | -5.875 | -3.649 | -3.590 |
| | Undirstøðukervi | -62.502 | -44.139 | -74 | -130 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | -13.973 | -15.991 | -2.231 | -2.695 |
| | Vinningur við frágongd av støðisogn | 1.216 | 749 | 1.067 | 608 |
| | Tap við frágongd av støðisogn | -13.231 | - | - | - |
| | **Avskrivingar tilsamans** | **-101.581** | **-72.772** | **-5.873** | **-6.727** |
| 4 | **INNTØKUR AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM VIRKJUM** | | | | |
| | Úrslit í atknýttum virkjum | - | - | 11.230 | 35.537 |
| | **Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum** | **-** | **-** | **11.230** | **35.537** |
| 5 | **RENTUINNTØKUR OG TÍLÍKAR INNTØKUR** | | | | |
| | Renta av innistandandi og skuldarum | 56 | 40 | - | 9 |
| | Renta av áogn í atknýttum virkjum | - | - | 2.198 | 1.916 |
| | Kursvinningur | 302 | 725 | 5 | 5 |
| | **Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur tilsamans** | **358** | **765** | **2.203** | **1.930** |
| 6 | **SKATTUR** | | | | |
| | Skattur av ársins skattskyldugu inntøku | -5.566 | -6.352 | -88 | -363 |
| | Javning av primo | 149 | 165 | - | 165 |
| | Javning av útsettum skatti | 4.719 | -2.006 | 140 | 158 |
| | **Skattur tilsamans** | **-698** | **-8.192** | **52** | **-40** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| Nota | | SAMTAK | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2022 (t.kr.) | 2021 (t.kr.) | 2022 (t.kr.) | 2021 (t.kr.) |
| **7** | **GJALD TIL ÁRSAÐALFUNDARVALDAN GRANNSKOÐARA** | | | | |
| | Lógarkravd grannskoðan | 400 | 409 | 155 | 155 |
| | Aðrar váttanir við trygd | | | | |
| | Skattaráðgeving | 27 | 27 | | 25 |
| | Aðrar tænastur | 153 | 266 | 86 | 117 |
| | **Samlað gjald til Spekt** | **580** | **702** | **241** | **297** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota

**8 IMMATERIELL STØÐISOGN**

| **SAMTAK** | Nýtslurættindi | Tilsamans |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2022 | 98.768 | 98.768 |
| Frágongd í árinum | - | - |
| Tilgongd í árinum | 6.988 | 6.988 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **105.759** | **105.759** |
| | | |
| Avskrivingar 1. januar 2022 | -82.364 | -82.364 |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - |
| Avskrivingar í árinum | -7.236 | -7.236 |
| **Avskrivingar 31. desember 2022** | **-89.600** | **-89.600** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **16.156** | **16.156** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **16.404** | **16.404** |
| | | |
| Verður avskrivað yvir | 3-5 ár | |

| **MÓÐURFELAG** | | |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2022 | 42.008 | 42.008 |
| Frágongd í árinum | - | - |
| Tilgongd í árinum | 549 | 549 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **42.557** | **42.557** |
| | | |
| Avskrivingar 1. januar 2022 | -38.699 | -38.699 |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - |
| Avskrivingar í árinum | -987 | -987 |
| **Avskrivingar 31. desember 2022** | **-39.686** | **-39.686** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **2.872** | **2.872** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **3.309** | **3.309** |
| | | |
| Verður avskrivað yvir | 3-5 ár | |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota

| 9 | **MATERIELL STØÐISOGN SAMTAK** | Grundøki og bygningar | Undir-støðukervi | Innbúgv og onnur rakstrartól | Støðisogn í gerð |
|---|---|---|---|---|---|
| | Útveganarvirði 1. januar 2022 | 260.308 | 905.053 | 194.459 | 27.094 |
| | Frágongd í árinum | - | -20.991 | -14.984 | -8.903 |
| | Tilgongd í árinum | 9.584 | 39.858 | 17.110 | 119.458 |
| | **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **269.893** | **923.921** | **196.585** | **137.649** |
| | | | | | |
| | Avskrivingar 1. januar 2022 | -103.500 | -586.026 | -152.740 | - |
| | Áður avskrivað upp á frágongd | - | 12.012 | 9.688 | - |
| | Avskrivingar í árinum | -5.856 | -62.502 | -13.973 | - |
| | **Avskrivingar 31. desember 2022** | **-109.356** | **-636.516** | **-157.025** | **-** |
| | | | | | |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **160.537** | **287.405** | **39.560** | **137.649** |
| | | | | | |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **156.809** | **319.027** | **41.719** | **27.094** |
| | | | | | |
| | Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 16,2 mió. kr. verða ikki avskrivað.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **MÓÐURFELAG** | | | | |
| Útveganarvirði 1. januar 2022 | 183.145 | 27.922 | 50.875 | 2.134 |
| Frágongd í árinum | - | - | -3.238 | -1.690 |
| Tilgongd í árinum | 94 | - | 5.162 | 1.885 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **183.239** | **27.922** | **52.799** | **2.330** |
| | | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2022 | -66.413 | -27.440 | -43.959 | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - | 2.674 | - |
| Avskrivingar í árinum | -3.649 | -74 | -2.231 | - |
| **Avskrivingar 31. desember 2022** | **-70.061** | **-27.514** | **-43.515** | **-** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **113.178** | **408** | **9.284** | **2.330** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **116.733** | **482** | **6.916** | **2.134** |
| | | | | |
| Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 13,9 mió. kr. verða ikki avskrivað.

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota

## 10 FÍGGJARLIG STØÐISOGN

| | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | Kapitalpartar í leyst atknýttum virkjum |
|---|---|---|
| **SAMTAK** | | |
| Útveganarpeningur 1. januar 2022 | - | 23.297 |
| Tilgongd í árinum | - | 53 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **-** | **23.349** |
| Upp- og niðurskrivingar 1. januar 2022 | - | -9.847 |
| Keyp av egnum kapitalpørtum | - | -3 |
| Vinningsbýti av egnum partabrøvum | - | 18 |
| Upp-/niðurskriving í árinum | - | -26 |
| Úrslit í kapitalpørtum | - | 4.071 |
| Avskriving goodwill | - | -871 |
| Vinningsbýti | - | -4.676 |
| Kapitalpartur við negativum innara virði níðurskrivaður yvir áogn hjá leyst atknýttum virki | - | 191 |
| **Upp- og niðurskrivingar 31. desember 2022** | **-** | **-11.144** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **-** | **12.206** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **-** | **13.449** |
| **MÓÐURFELAG** | | |
| Útveganarpeningur 1. januar 2022 | 226.663 | 23.297 |
| Tilgongd í árinum | - | 53 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2022** | **226.663** | **23.349** |
| Uppskrivingar 1. januar 2022 | 48.088 | 1.705 |
| Keyp av egnum kapitalpørtum | - | -3 |
| Vinningsbýti av egnum partabrøvum | - | 18 |
| Upp-/niðurskriving í árinum | - | -26 |
| Úrslit í kapitalpørtum | 11.230 | 4.072 |
| Vinningsbýti | -19.500 | -4.676 |
| Kapitalpartur við negativum innara virði níðurskrivaður yvir áogn hjá leyst atknýttum virki | - | 191 |
| **Uppskrivingar 31. desember 2022** | **39.818** | **1.280** |
| Niður- og avskrivingar 1. januar 2022 | - | -11.552 |
| Avskriving goodwill | - | -871 |
| **Niður- og avskrivingar 31. desember 2022** | **-** | **-12.424** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2022** | **266.480** | **12.206** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **274.751** | **13.449** |

Roknskaparliga restvirði av goodwill knýtt at kapitalpørtum var 0,9 mió. kr. pr. 31.12.2022 (2021: 1,8 mió.)

Kapitalpartarnir í atknýttum og øðrum virkjum sundurgreina seg soleiðis:

| Navn | Heimstaður | Eginogn mió. kr. | Úrslit mió. kr. | Ognarpartur |
|---|---|---|---|---|
| P/F Net | Tórshavn | 121,4 | 6,1 | 100% |
| P/F FT Samskifti | Tórshavn | 77,6 | -3,6 | 100% |
| P/F Televarpið | Tórshavn | 6,1 | 1,4 | 100% |
| P/F Shefa | Tórshavn | 61,8 | 7,5 | 100% |
| Shefa Telecom Limited | Whick, UK | 0,0 | 0,0 | 100% |
| P/F Formula | Tórshavn | 32,2 | 12,9 | 33% |
| Sp/f Føroyska Nummar Felagið | Tórshavn | 0,7 | 0,0 | 67% |
| Samtakið Klintra/Føroya Tele Í/F | Tórshavn | 0,1 | -0,9 | 50% |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota

**11 ÁOGN**

Øll áogn í móðurfelagnum og samtakinum fellur til gjaldingar innan 1 ár.

**12 EGINPENINGUR**

| SAMTAK | Partapeningur | Yvirkurs-grunnur | Uppskriving til innara virði | Fluttur vinningur | Uppskot til vinningsbýti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Saldo 1. januar 2022 | 60.000 | 24.869 | | 423.530 | 30.000 | 538.398 |
| Útgoldi vinningsbýti | | | | | -30.000 | -30.000 |
| Flutt frá ársúrslitinum | | | | -15.989 | 30.000 | 14.011 |
| **Eginpeningur 31. desember 2022** | **60.000** | **24.869** | | **407.540** | **30.000** | **522.409** |

| MÓÐURFELAG | Partapeningur | Yvirkurs-grunnur | Uppskriving til innara virði | Fluttur vinningur | Uppskot til vinningsbýti | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Saldo 1. januar 2022 | 60.000 | 24.869 | 38.241 | 385.289 | 30.000 | 538.398 |
| Uppskriving í árinum | | | -9.567 | | | -9.567 |
| Útgoldi vinningsbýti | | | | | -30.000 | -30.000 |
| Flutt frá ársúrslitinum | | | | -6.423 | 30.000 | 23.577 |
| **Eginpeningur 31. desember 2022** | **60.000** | **24.869** | **28.674** | **378.866** | **30.000** | **522.409** |

Partapeningurin fevnir um eitt partabræv áljóðandi 60 mió. kr.

| | SAMTAK 2022 (t.kr.) | SAMTAK 2021 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2022 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2021 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|
| **13 EFTIRLØN TIL FRÁFARIN STARVSFÓLK** | | | | |
| Avsett til eftirløn 1. januar | 919 | 1.881 | 919 | 1.881 |
| Útgoldið í eftirlønum | -251 | -341 | -251 | -341 |
| Regulering í árinum | 170 | -622 | 170 | -622 |
| **Avsett til eftirløn 31. desember** | **838** | **919** | **838** | **919** |
| **14 ÚTSETTUR SKATTUR** | | | | |
| Útsettur skattur 1. januar | 38.637 | 36.674 | 2.606 | 2.807 |
| Javning av primo | - | -43 | - | -43 |
| Javning av útsettum skatti | -4.719 | 2.006 | -140 | -158 |
| **Útsettur skattur 31. desembur** | **33.919** | **38.637** | **2.466** | **2.606** |

**15 Aðrar avsetingar**

Aðrar avsetingar fevna um burturbeiningarskyldu á 9,8 mió. kr.

| **16 TÍÐARAVMARKINGAR** | SAMTAK 2022 | SAMTAK 2021 | MÓÐURFELAG 2022 | MÓÐURFELAG 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | 18.906 | 24.450 | - | - |
| Fellur til gjaldingar millum 1 og 5 ár | 42.004 | 47.575 | - | - |
| Fellur til gjaldingar eftir 5 ár | 59.596 | 60.071 | - | - |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | **120.506** | **128.943** | **-** | **-** |

Tíðaravmarkingar umfatað forútgjald frá kundum.

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota

**17 NÆRSTANDANDI PARTAR**

Nærstandandi partar felagsins eru: Føroya Landsstýri, P/F FT Samskifti, P/F Net, P/F Shefa, P/F Televarpið, Shefa Telecom Limited, P/F Formula, P/F Formula Solutions, Sp/f Føroyska Nummar Felagið og Samtakið Klintra/Føroya Tele Í/F.

**Samhandil felagsins við nærstandandi partar**

Felagið hevur í árinum havt samhandil við dótturfeløgini. Allur handil er farin fram undir somu treytum sum allir aðrir handlar hjá felagnum.

**Avgerandi ávirkan**

Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin í felagnum

**18 VEÐSETINGAR, MØGULIGAR SKYLDUR V.M.**

VEÐSETINGAR

SAMTAK: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá tilsamans 255 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði upp á 113 mió. kr. Veittar eru ábyrgdir umvegis peningastovn fyri tilsamans 2,1 mió. kr.

| LEIGU- OG LANGLEIGUSÁTTMÁLAR (t.kr.) | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Innan 1 ár | 2.505 | 2.230 |
| Millum 1 og 5 ár | 140 | 676 |
| Aftaná 5 ár | - | - |
| **Tilsamans** | **2.645** | **2.906** |

Føroya Tele: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá tilsamans 255 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði uppá 113 mió. kr. Veittar eru ábyrgdir umvegis peningastovn fyri tilsamans 0,1 mió. Kr. Tøkur peningur á 0,4 mió kr. er veðsettur.

Kappingareftirlitið hevur skuldsett P/F Telefonverkið fyri at hava framt prísklemmu eftir § 11, stk. 1 í kappingarlógini, við einum sektaruppskotið á 27 mió. kr. Leiðslan metir at málið ikki førir til dóm og hetta ávirkar tí ikki fíggjarligu støðuna hjá felagnum.

P/F Telefonverkið er samskattað við tess 100% áttu føroysku dótturfeløg og heftir solidariskt mótvegis TAKS fyri øllum samskattingarkrøvum mótvegis hesum feløgum.

SHEFA: Føroya Tele borgar fyri, at Shefa yvirheldur sínar treytir í kontrakt við viðskiftafólk í útlandinum.

**19 ÓVISSA Í SAMBANDI VIÐ INNROKNING OG VIRÐISÁSETING**

Í 2022 hava skip verið atvold til skaðar á kaðlarnar hjá P/F Shefa, ið eru mettir til at kosta tilsamans 30 mió. kr. at umvæla. Skaðavaldarnir hava fulla endurgjaldsskyldu og leiðslan metir at útlitini eru góð fyri at felagið megnar at innkrevja endurgjøldini. 9,9 mió kr. ið felagið hevur avhildið til umvælingar í 2022 eru førdar sum áogn á fíggjarstøðuni.

**20 HØVUÐSVIRKSEMI**

Endamál felagsins er at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin fyri Føroya Tele (P/F Telefonverkið) fyri 2022 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki C stór.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til seinasta ár.

## UM INNROKNAN OG VIRÐISÁSETING Í ÁRSFRÁSØGNINI

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

## SAMTAKSFRÁSØGN

Samtaksfrásøgnin fevnir um móðurfelagið Føroya Tele umframt atknýtt feløg, har Føroya Tele beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættinum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

Í sambandi við konsolideringina verða innanhýsis inntøkur og útreiðslur, innanhýsis millumverandi eins og innanhýsis vinningur og tap av transaktiónum millum tey konsolideraðu feløgini úthavnoð.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða útjavnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum av nettoognum og skyldum hjá atknýttum feløgum útveganardagin.

Keypt ella nýstovnað feløg verða upptikin í samtaksfrásøgnina frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða upptikin í samtaksfrásøgnina fram til sølu/avtøku. Samanberingartølini verða ikki rættað fyri keypt, seld ella avtikin feløg.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøkuhátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útvegnarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir sum immateriell støðisogn og avskrivaðir við eins stórum upphæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

## MINNILUTAPARTAEIGARAR

Í samtaksfrásøgnini verða roknskaparupphæddir hjá atknýttum feløgum upptiknar við fullari upphædd. Lutfalsligi parturin av úrslitinum og eginpeninginum hjá minnilutapartaeigarunum í atknýttum feløgum verður javnaður árliga og upptikin sum serstakur postur í rakstrinum og fíggjarstøðuni.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrsta umfari umroknaðar eftir kursinum transaktiónsdagin.

Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin á gjaldsdegnum, verða tiknir við í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarligur postur.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til kursin við roknskaparárslok. Munurin millum kursin við roknskaparárslok og dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom, verður tikin við í rakstrinum

undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### NETTOSØLA

Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um útflýggjan og váðaskifti er farið fram áðrenn roknskaparlok. Nettoinntøkan verður uppgjørd uttan mvg og onnur avgjøld og við frádrátti av øllum givnum avsláttrum.

Niðanfyri er greitt frá, hvussu tær mest týðandi inntøkukeldurnar verða tiknar við í rakstrarroknskapin:

- Inntøkur frá føstum haldum verða tiknar við í rakstrarroknskapin yvir tíðarskeiðið, sum haldið fevnir um.
- Inntøkur frá telefonitænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin samsvarandi nýtslu av tænastum.
- Inntøkur frá forútgoldnum tænastum, sum til dømis talutíð, verða tíðaravmarkaðar og tiknar við í rakstrarroknskapin samsvarandi nýtslu av tænastum.
- Inntøkur frá sølu av handilsvørum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, tá útflýggjan og váðaskifti er farið fram.

Vísandi til §96, stk. 1 í ársroknskaparlógini er nettosølan av kappingarávum ikki býtt út á virkisøki. Landafrøðiligt uppbýti er tó gjørt.

### Útreiðslur til vørunýtslu, fjarskiftistænastur og ráskostnaðir

Útreiðslur til vørunýtslu, fjarskiftistænastur og ráskostnaðir fevna um tilfarsnýtslu til vørusølu, keyp av fjarskiftistænastum og ráskostnaðir.

### ANNAR RAKSTRARKOSTNAÐUR

Rakstrarkostnaður fevnir um allan annan rakstrarkostnað.

### GJALD FYRI RAKSTUR AV FJARSKIFTISEFTIRLITINUM

Talan er um gjald fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum ásett av landsstýrinum.

### STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### AV- OG NIÐURSKRIVINGAR

Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar uppá immateriella og materiella støðisogn, umframt vinning/tap við frágongd av materiellari støðisogn.

### ÚRSLIT AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM OG LEYST ATKNÝTTUM FELØGUM

Upphæddin inniheldur lutfalsliga partin av ársúrslitinum hjá atknýttum og leyst atknýttum feløgum eftir útjavnan av innanhýsis vinningi/tapi og við frádrátti av avskriving av goodwill.

Lutfalsligi parturin av skatti í atknýttum feløgum verður tikin við í upphæddini "Skattur" í rakstrarroknskapinum.

### FÍGGJARLIGAR INNTØKUR OG ÚTREIÐSLUR

Fíggjarligar inntøkur og útreiðslur fevna um rentuinntøkur og -útreiðslur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum,

skuld og transaktiónum í fremmandum gjaldoyra.

### SKATTUR AV ÁRSÚRSLITINUM

Partafelagsskattur og broyting í útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum verða rakstrarførd, meðan skattur viðvíkjandi bókingum beinleiðis á eginpeningin verður bókaður beinleiðis á eginpeningin.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapin og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Móðurfelagið er samskattað við P/F FT Samskifti, P/F Net, P/F Televarpið og P/F Shefa. Partafelagsskatturin verður býttur millum tey samskattaðu feløgini í mun til lutfalsligu skattskyldugu inntøkuna hjá hesum feløgum.

## FÍGGJARSTØÐAN

### IMMATERIELL STØÐISOGN

Immateriell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi 10 ár. Avskrivingartíðarskeiðið er longst fyri strategiskar íløgur í feløg við sterkari marknaðarstøðu.

Menningarverkætlanir verða ognarførdar, um tær eru nágreiniliga lýstar, um felagið ætlar og er ført fyri at gagnnýta úrslitini, um kostprísurin kann gerast upp álítandi og um nóg góð trygd er fyri, at inntøkur í framtíðini kunnu forrenta menningarkostnaðin umframt framleiðslu-, sølu- og umsitingarligu kostnaðirnar. Aðrir menningarkostnaðir verða útreiðsluførdir í rakstrarroknskapinum, so hvørt sum kostnaðirnir verða staðfestir. Ásettu avskrivingartíðarskeiðini eru:

| | |
|---|---|
| Goodwill | 2-10 ár |
| Útvegaðir einkarrættir | 3-5 ár |
| Menningarverkætlanir | 3-5 ár |

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um, um tørvur er á niðurskriving.

### MATERIELL STØÐISOGN

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Ásettu avskrivingartíðarskeiðini og restvirðini eru:

| | Áramál | Restvirði |
|---|---|---|
| Grundøki | - | 100% |
| Bygningar | 30-50 ár | 0% |
| Undirstøðukervi | 10-25 ár | 0% |
| Innbúgv o.o. rakstrartól | 2-10 ár | 0% |

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um, um tørvur er á niðurskriving.

Vinningur ella tap við frágongd av materiellari støðisogn verður uppgjørt sum munurin millum sølupris við frádrátti av søluútreiðslum og roknskaparliga virðið á sølutíðspunktinum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapinum undir avskrivingum.

## KAPITALPARTAR Í ATKNÝTTUM OG LEYST ATKNÝTTUM FELØGUM

Kapitalpartar í atknýttum og leyst atknýttum feløgum verða tiknir við í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av innara virðinum hjá feløgunum við ískoyti av restvirðinum á møguligum goodwill.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum og leyst atknýttum feløgum verður flutt til eginpeningin í netto-uppskrivingargrunn eftir innaravirðis-háttinum í tann mun, roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøku-hátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir saman við kapitalpørtum í atknýttum og leyst atknýttum feløgum, og avskrivaðir við eins stórum upphæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

Atknýtt og leyst atknýtt feløg við negativum roknskaparligum innara virði verða upptikin til null, og ein møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niður-skrivað við lutfalsliga partinum av nega-tiva innara virðinum hjá móðurfelagnum. Um negativa roknskaparliga innara virðið er hægri enn áognin, verður rest-upphæddin tikin við sum skyldur í tann mun, móðurfelagið hevur rættarliga ella veruliga skyldu til at taka á seg fíggjarligu skyldurnar hjá felagnum.

## ONNUR VIRÐISBRØV

Børsskrásett virðisbrøv, ið eru tikin við sum ogn í umferð, verða virðisásett til kursvirðið við roknskaparlok.

## VØRUGOYMSLUR

Vørugoymslur verða virðissettar til kost-prís eftir FIFO-háttinum. Er nettosølu-virðið lægri enn kostprísurin, verður vørugoymslan niðurskrivað til lægra virðið.

Fyri handilsvørur umframt rávørur og hjálpitilfar svarar kostprísurin til útvega-narprísin.

Fyri framleiddar liðugvørur og vørur undir framleiðslu fevnir kostprísurin um kostprísin fyri rávørur, hjálpitilfar, beinleiðis løn og óbeinleiðis framleiðslukostnaðir.

## ÁOGN

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har lagt verður upp fyri væntað-um tapum.

## TÍÐARAVMARKINGAR (ÁOGN)

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum, herundir forútgoldin leiga.

## EGINPENINGUR OG VINNINGSBÝTI

Uppskot til vinningsbýti verður innroknað sum ein upphædd fyri seg undir eginognini. Vinningsbýti verður innroknað sum ein skylda, tá ið útlutanin er samtykt av aðalfundinum.

## PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR

Partafelagsskattur er tikin við í fíggjar-støðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku.

Útsettur skattur verður uppgjørdur við útgangsstøði í munum millum roknsk-aparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum.

Negativur útsettur skattur (skattaáogn) verður virðissettur til tað virðið, hesin væntandi kann minka partafelagsskattin í framtíðini.

## AÐRAR AVSETTAR SKYLDUR

Um felagið við roknskaparlok hevur rættarliga ella veruliga skyldu, og tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, verður skyldan avsett.

## SKULD

Við stovnan verða lán innroknað í fíggjarstøðuna við móttiknari upphædd eftir frádrátt av stovningarútreiðslum. Síðani verða lán virðissett til amortiseraðan kostprís.

Onnur skuld verður virðissett til netto-realisatiónsvirðið.

## TÍÐARAVMARKINGAR (SKULD)

Tíðaravmarkingar fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparárum.

## PENINGASTREYMSYVIRLIT

Peningastreymsútgreiningin vísir felagsins peningastreym gjøgnum árið umframt gjaldførisstøðuna við árslok. Peningastreymurin er serliga knýttur at trimum økjum: Rakstur, íløgur og fígging. Peningastreymsútgreiningin verður sett upp soleiðis, at peningastreymur frá rakstri verður vístur óbeinleiðis við útgangsstøði í rakstrarinntøkunum og rakstrarútreiðslunum í rakstrarroknskapinum.

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv upptikin undir ogn í umferð.

Peningastreymur frá rakstri verður uppgjørdur sum úrslit av primerum rakstri javnað fyri ikki tøkar rakstrarupphæddir við ískoyti av øking ella minking í arbeiðspeningi, fíggjarligum og óvanligum upphæddum og frádrigið goldnan partafelagsskatt.

Arbeiðspeningur fevnir um ogn í umferð, uttan tær upphæddir, sum eru í tøkum peningi, og stuttfreistaða skuld, uttan bankaskuld, veðskuld, skatt og vinningsbýti. Soleiðis eru tøkur peningur og møgulig virðisbrøv upptikin undir ogn í umferð ikki tikin við.

Peningastreymur til íløgur fevnir um keyp og sølu av støðisogn.

Keypsupphæddir verða uppgjørdar til útveganarvirði. Søluupphæddir verða uppgjørdar til søluprís við frádrátti av handilskostnaði.

Gjaldføri frá fígging fevnir um gjøld til og frá partaeigarum umframt upptøku og avdráttir av veðskuld og aðrari langfreistaðari og stuttfreistaðari skuld, sum ikki er tikin við í arbeiðspeninginum.

# NEVND & STJÓRN

## Bjarni Arnason, formaður

| | |
|---|---|
| Starv: | Partnari og stjóri í Sp/f NUMO |
| Bústaður: | Hoyvík |
| Útbúgving: | Cand.merc.aud<br>Bachelor í vinnubúskapi<br>Bachelor í løgfrøði |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið<br>Sp/f NUMO |

## Johnni Poulsen, næstformaður

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í P/F Magn |
| Bústaður: | Miðvágur |
| Útbúgving: | M.Sc. Economics and Business Administration |
| Nevndarlimur síðan: | 2016 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið<br>P/F Demich<br>P/F Flatnahagi |

## Annbritt Tummasdóttir Andersen

| | |
|---|---|
| Starv: | Partnari í Momentum Consulting A/S<br>Stjóri í Tummasdóttir Holding ApS |
| Bústaður: | Hellerup, Danmark |
| Útbúgving: | Cand.merc.fir |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið<br>Momentum Consulting A/S |

## Lena L. Mohr

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í Sp/f LLM Íløgur |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | Cand.negot |
| Nevndarlimur síðan: | 2020 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

## Ólavur Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | KT-mennari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | M.Sc. Software Technology, B.Sc. Electrical Engineering |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### Levi T. Nybo, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | Vinnuráðgevi |
| Bústaður: | Strendur |
| Útbúgving: | Diplom í international handel og markedsføring |
| Nevndarlimur síðan: | 2019 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### Finnbjørn Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | Virkisráðgevi |
| Bústaður: | Kaldbak |
| Útbúgving: | BSc in Business Administration and Information Technology |
| Nevndarlimur síðan: | 2019 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

### Jan Ziskasen, stjóri

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í P/F Telefonverkið |
| | Stjóri í Sp/f 31.10.67 |
| Bústaður: | Hoyvík |
| Utbúgving: | M.Sc. in Business Administration and Information Systems |
| Nevndarsessir: | P/F NET |
| | P/F FT Samskifti |
| | P/F Televarpið |
| | P/F Shefa |
| | P/F Formula |
| | Sp/f Føroyska Nummarfelagið |
| | KT-Felagið |
| | Winterhawk Consulting PLC |
| | Burðardygt Vinnulív |